# Heilsurøktarar til Heimið við Vágna

Brennur tú fyri at skapa góð og virðilig kor saman við bú- og starvsfólkum á Heiminum við Vágna, so er tað kanska tær, vit sóknast eftir.

## Vit sóknast eftir

- Heilsurøktara á setanarbrøki 0,8 at byrja 1. des. 2017, ella eftir nærri avtalu
- Avloysara fyri heilsurøktara á setanarbrøki 0,8 frá 1.des. 2017 – 30. nov. 2018, byrjast kann eftir nærri avtalu

Arbeitt verður í skiftandi vaktum og annað hvørt vikuskifti.

Á Heiminum við Vágna eru 24 pláss, skipað í tríggjar eindir. Í eindunum á ovaru hæddini búgva 16 fólk, meðan eindin á niðaru hæddini er skipað sum umlættingareind, fyri at stuðla undir eitt so virkið og innihaldsríkt lív sum gjørligt í egnum heimi - hóast førleikatarn.

Høvuðsuppgávan hjá starvsfólkunum í Heiminum við Vágna tekur støði í visjónini hjá NBH, sum er:

- NBH strembar eftir at skapa fjøltáttaðar møguleikar fyri nærveru, eldru borgarum, avvarðandi og starvsfólkum at gagni.
- NBH vil raðfesta fleksibilitet og samskapan í teimum loysnum, ið framyvir skulu finnast á eldraøkinum.
- Fyritreytin er eitt hugvekjandi øki, sum er grundað á álit, høgt fakligt støði og virðing.

## Førleikakrøv

- Útbúgving sum heilsurøktari
- Áhuga í at arbeiða við eldri borgarum
- Áhugi og royndir innan demens er ein fyrimunur
- Góð samstarvsevni

## Vit kunnu bjóða

- Fakligar avbjóðingar
- Spennandi og sjálvstøðugt starv
- Gott samstarv við onnur fakfólk

## Lønar- og setanartreytir:

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Heilsurøktarafelagið.

Nærri kunning um størvini fæst við at venda sær til Merry Hansen, deildarleiðara, á tlf. +298 793440.

Umsókn, við avritum av prógvum v.m., verður at senda til nbh@nbh.fo ella Norðoya Bú- og Heimatænastu, Nólsoyar Pálsgøta 32, Postsmoga 2, FO-710 Klaksvík.

Umsóknarfreistin til størvini er á middegi fríggjadagin 24. november 2017.